## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og fyrrapartin regn, annars turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og fyrrapartin ælingur, annars turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi, turt og sólglottar, men týsdagin veksur hann vindin upp í ein strúk av suðri og regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 14 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# "Fólk keypa eitt kók hvørja ferð"

**66 ára gamli Anker í Byrgi er seinastu fimm árini vorðin sonn býarmynd í Havn. So at siga hvønn dag stendur hann við bili sínum í Vágsbotni og selir fisk til vælnøgd havnarfólk.**

DAGSINS FØROYINGUR



*Anker í Byrgi býr undir Gøtueiði. Hann er tó dagligur gestur í høvuðsstaðnum har hann selir fiskavørur. – fólk eru sera fegin um henda møguleikan at keypa sær fisk, sigur hann.*

**Hvussu leingi hevur tú selt fisk her í Vágsbotni?**
- Eg havi selt fiska her í eini fimm ár. Eg sigldi sum kokkur, men misti "bláu bók" orsakað av sukursjúku. Nú havi eg mítt fasta pláss her í Vágsbotni, men eri av og á eisini í Vágum, Sandoynni og í Klaksvík. Eg síggi bara, at tað er tørvur á hesum vørum, tí fólk eru sera fegin um at kunna keypa fisk frá mær.

**Hvat slag av fiski keypa fólk?**
- Eg havi fyri tað mesta kjálkar og lippir, men onkutíð eisini kalvaspraggur. Fólk keypa vanliga eitt kók hvørja ferð.

**Hvat gert tú í frítíðini?**
- Frítíðina nýti eg fyri ein stóran part av fáa fatur á høvdum og at skera tey til kjálkar og lippur. Annars hyggi eg í sjónvarp og lesi bløðini. Fiskivinnan hevur mín serliga áhuga.

**Hevur tú verið uttanlands í summar?**
- Nei, ikki í ár. Eg ætli mær vestur í Vágarnar leygarkvøldið, tá kappast skal um Føroya stuttligasta mann. Eg kenni væl Hilmar Jan. Hann vann jú í fjør, og eg vænti tí at hann fer at gera okkurt ordiligt í ár.

**Hvørjum vilt tú heilsa?**
- Eg vil fegin heilsa teimum mongu kundunum, sum keypa frá mær her í Vágsbotni.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | -- |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 17 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 18 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 30 |
| Athen | -- |
| Malta | 26 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 17 |
| New York | 21 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. – ex ódnin "DEBBY – á 53N-28V fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjanáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer eystureftir og grynnist nakað. Brúgvalagið við Føroyar fer spakuliga norðureftir.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/8 kl. $06^{00}$– 30/8. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í august: 0,2° - Mesti hiti máldur í august: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 29/8 kl. $06^{00}$– 30/8 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í august: 42,8 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin




## VESTFALLSKYRRINDI

31. august — Fyrra kvarter
8. september — Mánin næstur jørðini
26. august — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. Aug | 00.01 | 12.37 | 11.37 | - | 11.52 | - | 02.01 | 14.37 | 03.01 | 15.37 | 10.52 | 23.29 | 09.52 | 22.29 | 00.16 | 12.52 | 01.16 | 13.52 | - | 12.22 | 01.01 | 13.37 |
| 1. Sept. | 01.14 | 13.54 | 00.14 | 12.54 | 00.29 | 13.09 | 03.14 | 15.54 | 04.14 | 16.54 | - | 12.09 | 11.09 | 23.49 | 01.29 | 14.09 | 02.29 | 15.09 | 00.59 | 13.39 | 02.14 | 14.54 |
| 2. Sept | 02.34 | 15.00 | 01.34 | 14.00 | 01.49 | 14.15 | 04.34 | 17.00 | 05.34 | 18.00 | 00.49 | 13.15 | - | 12.15 | 02.49 | 15.15 | 03.49 | 16.15 | 02.19 | 14.45 | 03.34 | 16.00 |
| 3. Sept | 03.26 | 15.52 | 02.26 | 14.52 | 02.41 | 15.07 | 05.26 | 17.52 | 06.26 | 18.52 | 01.41 | 14.07 | 00.41 | 13.07 | 03.41 | 16.07 | 04.41 | 17.07 | 03.11 | 15.37 | 04.26 | 16.52 |
| 4. Sept | 04.18 | 16.45 | 03.18 | 15.45 | 03.33 | 16.00 | 06.18 | 18.45 | 07.18 | 19.45 | 02.33 | 15.00 | 01.33 | 14.00 | 04.33 | 17.00 | 05.33 | 18.00 | 04.03 | 16.30 | 05.18 | 17.45 |

5 707265 100050 >